FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 9. juni 2022
J. nr.: 22/10669-5
Viðgjørt: JS

Svar til fyrispurning nr. 52-203/2022 frá Ingilín D. Strøm, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um stjóraløna í Posta.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa orsøkina til, at nevndin í almenna partafelagnum Posta hevur givið stjóranum eina lønarhækkan á 184.000 krónur í 2021?
2. Metir landsstýrismaðurin tað vera rætt, at nevndin hevur hækkað lønina hjá stjóranum við 184.000 krónum (12,5 prosentum)?
3. Samsvarar lønin hjá stjóranum í Posta á góðar 1,7 mió. kr. um árið við aðrar stjóralønir í almennum partafeløgum?
4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvat stjóralønirnar eru í øðrum almennum partafeløgum, sum hoyra undir hansara málsøki?

Svar til fyrispurning nr. 1
Sum kunnugt verður Posta sum alment partafelag rikið við armslongd frá landsstýrinum. Fíggjarmálaráðið hevur tí vent sær til nevndina í Posta við spurninginum um, hví lønin hjá stjóranum hjá Posta varð hækkað.

Nevndin upplýsir at tá ið stjórin í Posta varð settur í 2011, varð avtala gjørd, um at hann fekk kr. 86.000,00 um mánaðin umframt 15% í eftirløn. Harafturat varð ein bonusskipan/áeggjanarviðurgjald avtalað, sum var tengt at arbeiðinum við at fáa lønsemi í Posta.

Nevndin sigur, at nú hevur grundlønin hjá stjóranum verið óbroytt í 10 ár. Í 2021 var grundlønin tí hækkað við 8,14% og áeggjanarviðurgjaldið varð broytt soleiðis, at tað nú er tengt at rakstraríkastinum og úrslitinum fyri skatt.

Svar til fyrispurning nr. 2
Grundlønin hjá stjóranum var sum nevnt óbroytt í tíðarskeiðinum 2011 til 2021, tá grundlønin varð hækkað við 8,14%. Í sama tíðarskeiði hækkaðu lønirnar á almenna arbeiðsmarknaðinum við áleið 19%.

Tað er nevndin ið ger samsýningarpolitikk fyri stjórnina í fyritøkuni, og hevur nevndin ynskt, at samlaða lønin er sett saman av eini grundløn og einum áeggjanarviðurgjaldi.

Landsfyritøkur eiga at vísa varsemi tá slík áeggjanarviðurgjøld verða ásett, og serliga hevur tað týdning, at hesi verða tengd at ítøkiligum málum, ið gagna langtíðarmálum hjá fyritøkuni og

virka fyri, at fyritøkan stendur sterkari í framtíðini. Tá eitt tíðarskeið er liðið eigur at verða eftirmett, um gjaldið stendur mát við tey avrik, sum stjórin hevur ávirkan á.

Posta hevur seinastu árini verið fyri stórum broytingum, og týðandi nútímansgeringar eru framdar í virksemi felagsins. Áeggjarnarviðurgjøld eru serliga viðkomandi í slíkum støðum. Tað er ábyrgdin hjá nevndini at áseta samsýningina hjá stjóranum soleiðis, at samlaða lønin stendur mát við avrikið.

Fíggjarmálaráðið hevur arbeitt við at skipa umsitingina av almennum fyritøkum. Eitt uppskot til leiðreglur er gjørt og verður nú viðgjørt endaligt politiskt. Málsetningar fyri fyritøkuna og regluligt samskifti um viðurskifti, ið hava týdning fyri langtíðarmál og avrik hjá fyritøkuni, eru týðandi partar av leiðreglunum.

Svar til fyrispurning nr. 3
Nevndin í felagnum ásetur samsýningina til stjóran. Grundlønin í 2021 var kr. 1.283.405,52. Áeggjanarviðurgjaldið var 377.674,48. Um áeggjanarviðurgjald verður víst til viðmerkingarnar í svari 2.

Samlaða lønin er grundað á støddd, ábyrgd og hvussu samansett virksemi er. Vinnufeløg landsins eru ymisk, og tí eigur samsýningin eisini at vera ymisk.

Svar til fyrispurning nr. 4
Stjóralønirnar í teimum partafeløgum, ið hoyra undir málsøkið hjá landsstýrismanninum:

Felag	Ognarlutur landsins	Løn til stjóran
P/f Føroya Tele (samtak)	100%	2.276.000
P/f Posta	100%	1.661.080
P/f Atlantic Airways (samtak)	100%	1.398.000
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	100%	1.239.797
P/f Vága Floghavn (samtak)	100%	974.331
P/f Tunnil*	100%	690.000

*Raksturin av P/f Vágatunnilin og P/f Norðoyatunnilin er lagdur í P/F Tunnil.

Lønin er fyri roknskaparárið 2021. Upphæddin er íroknað áeggjanarviðurgjald og eftirløn. Einans partafeløg, sum landið eigur 100% eru tald við.

Tinganes, 9. juni 2022

Uni Rasmussen
landsstýrismaður í fíggjarmálum